**Fiskimálaráðið**

Dagfesting: 5. mai 2017
Mál nr.: 17/00115-61

**Fylgiskjal 1**

**Ummælisskjal**

*Ummælisskjal til uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi*

Uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi varð sent til hoyringar hjá viðkomandi pørtum 6. mars 2017 við hoyringsfreist 27. mars 2017.

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Fiskivinnuráðnum, Felagnum Trolbátar, Vørn, Havstovuni, Føroya Landfúta, Vinnuhúsinum, Sjóvinnustýrinum/Skipaskrásetingini, Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Umhvørvisstovuni, Dátueftirlitinum, Advokatfelag Føroya, Felagnum fyri føroyskar peningastovnar, Búskaparráðnum, Fróðskaparsetur Føroya, Hummarafelagnum og stjórnarráðunum.

Inn eru komin hoyringssvar frá Vinnulívsráðnum í Klaksvík, Felagnum Trolbátar (bólkur 4T), Búskaparráðnum, Dátueftirlitinum, Føroya Fiskimannafelag, Havstovuni, Jógvan Martin Joensen (m/s Norðhavið), m/s Kambur, Vørn/Fiskiveiðieftirlitinum, Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Maskinmeistarafelagnum, Dánjal í Skálum (m/s Vesturbúgvin), Hummarafelagnum, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Felagnum Línuskip, Fiskivinnuráðnum, Føroya Reiðarafelag (verksmiðjutrolarar), Náttúrugripasavninum, Útlendingastovuni, Skráseting Føroya, Felagnum Nótaskip, BankNordik, Faroe Origin, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Fíggjarmálaráðnum, Føroya Reiðarafelag, Felagnum Garnaskip, Felagnum Trolskip og Felagnum Lemmatrolarar, Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Reiðarafelag (vegna JFK og Framherji), Ragnar Mortensen og Føroya Landfúta.

Almannamálaráðið, Samferðslumálaráðið og Mentamálaráðið hava svarað, at ongar viðmerkingar eru til uppskotið.

Øll innkomin hoyringssvar eru løgd saman við hesum uppskoti, og niðanfyri er ein stuttur samandráttur av innkomnu hoyringsviðmerkingunum og støða landsstýrismansins til viðmerkingarnar:

**Vinnulívsráðið í Klaksvík** vísir á, at tað er umráðandi við tryggum kørmum hjá vinnuni, og at tað at kollvelta bygnaðin í verandi vinnubygnaði upp á fá ár, kann hava stórar og álvarsamar avleiðingar við sær.

**Felagið Trolbátar** (bólkur 4T) mælir til, at teir halda fram undir fiskidagaskipanini og viðmerkir, at kvotuuppskotið er deyðadómur fyri trolbátarnar og undrast á, at útróðrarflotin framhaldandi skal virka undir dagaskipan. Harafturat verður víst á, at trolbátarnir eru ein lítil partur av tí samlaðu veiðiskipanini, og at teir eru avmarkaðir til eitt sera lítið veiðiøki, at veiðan hjá trolbátunum í stóran mun er árstíðarfiskiskapur og meira blandingsfiskiskapur enn aðrir. Víst verður annars til hoyringssvarið hjá Føroya Reiðarafelag.

**Búskaparráðið** hevur svarað, at ráðið hevur ta mannagongd, at ráðið ikki viðmerkir lógaruppskotum.

**Dátueftirlitið** vísir m.a. á trygdarkunngerðina um trygd ísv. viðgerð av persónsupplýsingum og hevur ymsar viðmerkingar og tilmæli um einstakar broytingar í viðmerkingunum til ásetingar um viðgerð og elektroniskum flutningi av persónsupplýsingum. Víst verður til hoyringssvarið.

**Føroya Fiskimannafelag** tekur ikki undir við kvotum, tí tað letur seg ikki gera í praksis og mæla til at varðveita fiskidagaskipanina. Harafturat verður ei heldur tikið undir við at taka veiðiloyvi burtur, m.a. tí vandi er fyri, at virkir fara at leiga sær eina dangu við bíligari manning, og fer tað at úthola skipanina og minka um trygdarviðurskiftini. Harafturat gevur tað møguleika hjá strámonnum at gera seg inn á føroyska samfelagið. Skotið verður upp, at revsing, fyri at sáttmálin á økinum ikki verður fylgdur, skal vera 2 ára fongsul. Føroya Fiskimannafelag tekur ikki undir við uppboðssølu, tí skipanin skapar ótryggleika og er ómoralsk, tí hon letur upp fyri spekulantum við gomlum dangum. Harafturímóti tekur Føroya Fiskimannafelag undir við uppboðssølu av veiddum fiski, tí hetta gevur munandi hægri prís.

**Havstovan** hevur m.a. svarað, at heildarkvotur við støði í umsitingarætlanum eru eitt munagott framstig. Havstovan vísir á, at hon ikki hevur arbeiðsorku at gera tilmæli fyri havtasku, og at tað er torført at tilmæla fiskidagatal fyri útróðrarflotan, tí at sambandið millum fiskidagar og veiðitrýst er so skiftandi. Havstovan vil hava fulla atgongd til veiðidagbøkur og ikki ígjøgnum Vørn ella Hagstovuna. Harafturat hevur Havstovan ymsar viðmerkingar og rættingar til ásetingarnar, ið viðkoma Havstovuni. Víst verður til hoyringssvarið.

**Jógvan Martin Joensen** (m/s Norðhavið) tekur undir við, at fyribrigdið “veiðiloyvi” verður tikið burtur, tí verandi krav um veiðiloyvi er ein týðandi hindring fyri optimalari gagnnýtslu av kvotunum. Spurningurin er tó settur við, um mann keypir tons ella prosent á uppboðssølu. Jógvan Martin Joensen dámar væl nýggju treytina um, at persónur skal hava verið skrásettur í Fólkayvirlitinum í 5 ár samlað heldur enn 2 tey seinastu árini. Víst verður á, at tá funnið verður eitt nýtt fiskaslag, er neyðugt, at tann, sum finnur tað, eisini fær ágóðan av hesum. 75% kravið um landing í Føroyum má fylgja við einum minstaprísi, eitt nú við støði í prísum frá Noregi, Íslandi og Danmark.

**M/s Kambur** mælir til, at bólkur 3 heldur fram við at hava fiskidagar við Føroyar. Um uppskotið ikki verður broytt samsvarandi hesum, verður skotin upp ein annar máti at rokna seg fram til kvoturnar/fiskidagarnar. Kambur er ímóti brúksskyldu, tí so verður ov nógv fiskað, tað verður ein straffur at lata grunnarnar fáa frið. Harafturat verður viðmerkt, at reglan um alt til lands ikki ber til hjá teimum.

**Vørn/Fiskiveiðieftirlitið** hevur m.a. svarað, at skiftið frá fiskidøgum til kvotur broytir arbeiðið hjá eftirlitinum, og neyðugt er við øktari arbeiðsorku at hava eftirlit við kvotuskipanini. Tað, at rættindi ikki longur verða knýtt at einum fiskifari, ger eisini, at Vørn skal hava nýggja telduskipan og mannagongdir. Tørvur verður tí á størri fígging til Vørn. Vørn hevur harafturat

sent inn fleir viðmerkingar og uppskot til rættingar v.m. til einstøku greinarnar í uppskotinum. Víst verður til hoyringssvarið.

**Heilsufrøðiliga Starvsstovan** hevur spurt inn til, um lógin gevur Heilsufrøðiligu Starvsstovuni heimild at fáa upplýsingar frá Vørn um eftirlit, ið Vørn ger umborð á skipum. Harafturat verður m.a. víst á, at góðkenning av verksmiðjutrolarum til at útflyta til 3. lond kann taka tíð, og verður kanska ein seinkandi faktorur.

**Maskinmeistarafelagið** hevur viðmerkt, at tað ikki er lætt at hava felags støðu til broytingarnar, tí limirnir eru so ymiskir, men at allar broytingar í longdini kunnu føra til versnandi sáttmálaviðurskifti fyri limir felagsins.

**Dánjal í Skálum** (m/s Vesturbúgvin) hevur svarað, at tað er ein óbótaligur feilur at fara frá fiskidagaskipanini, tí hon í fiskiskapinum er so nógv betur enn kvotuskipanin. Skjóta upp, at lykilin 75/25 eigur at vera 25/75. Harafturat er svarað, at uppboðssøla førkar okkum frá føroyskum fiskimonnum til útlendskar fiskimenn. Mett verður, at uppboðssøla er bert ein 'búskaparteori', sum forkemur allari føroyskari fiskivinnu, og skipanin í uppskotinum ger, at 100% kemur á uppboðssølu við tíðini.

**Hummarafelagið** hevur svarað, at tað er gott at fáa steðgað verandi veiðu av hummara til húsbrúks.

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag** mælir til ikki at áseta heildarkvotur fyri fiskiskapin undir Føroyum eftir botnfiski, í tonsum, men at áseta fiskidagar, og at eingin missur kvotu við hesi skipan. Harafturat verður mælt til, at ein nevnd skal setast til at velja út reiðarar at fiska. Fiskimálaráðharrin skal vera formaður og so floksformenn limir. Eisini verður mælt til, at 100% av allari veiðu skal um uppboðssøluna, eftir at fiskurin er veiddur. Hetta fyri at tryggja marknaðarprísir. Víst verður á, at givin rættindi eiga ikki at kunna takast aftur uttan endurgjald og uttan sakliga og haldgóða grund. Viðmerkt verður eisini, at ein persónur eigur, sambært § 5, stk. 2, nr. 2, at hava verið skrásettur í Fólkayvirlitinum í Føroyum í minsta lagi 10 tey seinastu árini. Eisini verður sagt, at fiskidagar eiga at verða avhendaðir frá reiðara til landsstýri. Føroya Skipara- og Navigatørfelag mælir frá verandi uppskoti til tekst um manningarviðurskifti. Talan eigur at vera um núverandi manningarfeløg. Mælt verður til, at økisfriðingar verða stongdar eisini frameftir við lóg. Føroya Skipara- og Navigatørfelag mælir eisini til, at um skip hava verið til fiskarí í meir enn 5 samdøgur, skulu skip liggja í minst 24 tímar eftir, og at tað skulu vera tvungnir legudagar. Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur harafturat onkrar rættingar til orðingar o.a. Víst verður til hoyringssvarið.

**Felagið Línuskip** mælir til, at skipini í bólki 3 skulu halda fram við fiskidagaskipanini á nærleiðunum. Felagið er harðliga ímóti uppboðssølu av livandi tilfeingi, m.a. tí tað er ójøvn kapping millum trolarar og línuskip. Eisini gongur so illa hjá hesum skipum í dag, at einki er at gjalda á eini uppboðssølu. Mælt verður til, at landingar uttanlands skulu roknast út á eitt tíðarskeið, sum er longri enn 4 mánaðir, t.d. 12 ella 6 mánaðir. Mælt verður harafturat frá at seta krav um, at eitt felag ikki má hava negativa eginogn í 2 ár, m.a. tí tað verður mett, at hetta ikki sigur alt um útlendskan kapital í einum samtaki og er eingin trygd fyri, at herdu krøvini fara at forða fyri útlendskum kapitali. Harafturat verður mælt frá, at landsstýrismaðurin einsamallur saman við Havstovuni fær heimild at áseta kvotur. Hetta eigur at gerast saman við vinnuni. Mælt verður til eitt time-out, og at minst 2/3 av tingfólkunum skulu taka undir við uppskotinum. Harafturat verður viðmerkt, at útrokningar fyri rættindi á nær- og fjarleiðum í 2018 og frameftir eiga at verða lýstar betri fyri hvørt skip og bólk fyri at fyribyrgja órættvísum

býti. Miðalveiðan eigur at roknast í eitt langt tíðarskeið, og umrokningin við 75/25 rakar bæði tilvildarligt og við afturvirkandi kraft. Avleiðingar av uppskotinum eru eisini illa lýstar. Viðmerkt verður harafturat, at uppskotið er alt ov fløkt og víðfevnt, og gevur tað fiskimálaráðharranum alt ov víðfevndar heimildir.

**Fiskivinnuráðið** hevur viðmerkt, at ráðslimirnir vísa til hoyringsskrivini frá feløgunum, teir umboða. Víst verður eisini á, at uppskotið er sera torskilt, og at hoyringsfreistin er ov stutt.

**Reiðarafelagið** (verksmiðjutrolarar) hevur svarað, at reglurnar um anti-trust rakar ójavnt, og mælt verður heldur til, at eitt hægri yvirskipað mark fyri alla fiskivinnuna verður sett. Reiðarafelagið (verksmiðjutrolarar) er harafturat ímóti einari skipan, har fiskirættindi verða lutað út á uppboðssølu, m.a. tí tað førir til, at tað samfelagsliga fíggjarliga úrslitið av fiskivinnuni verður minni. Skipanin er tann, at verandi rættindi so líðandi verða niðurlaðað. Tað skapar ótryggleika, og einki annað land hevur slíka skipan. Mælt verður til time-out, og at farið verður undir eina nýggja tilgongd saman við t.d. Reiðarafelagnum. Mælt verður til at leingja skipanina í eitt ella nøkur ár fyri fyrst. Uppskotið er ófullfíggjað og fløkt og ikki búgvið at leggja fyri tingið. Mæla til at verandi skipan heldur fram, men tó so, at loyvishavarar rinda tilfeingisgjald til landskassan. Víst verður í hoyringssvarinum annars til hoyringsskriv frá Føroya Reiðarafelag og skriv frá Hanus Hansen, P/F JFK Trol, um avleiðing av uppboðssølu.

**Náttúrugripasavnið** hevur viðmerkingar til einstøku greinarnar í uppskotinum, undir hesum serliga til kapittul 10. Víst verður m.a. á, at tað er avgerandi neyðugt ikki at avmarka rættin hjá Náttúrugripasavninum at virka eftir sínum endamáli. Víst verður til hoyringssvarið.

**Útlendingastovan** vísir á løgfrøðiliga avbjóðing við at broyta reglurnar um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum soleiðis, at tær koma at fevna um øll føroysk skip og manningar, og at Útlendingastovan hevur fasta mannagongd viðv. arbeiðs- og uppihaldsloyvi og kannar eftir, um útlendingur hevur fingið løn í samsvari við føroysk setanar- og lønarviðurskifti, tá hesin søkir um leingjan.

**Skráseting Føroya** vísir í mun til grein 5, stk. 3 og 4 á, at tað finnast aðrir felagsformar enn teir nevndu, og kann tað vera trupult ella arbeiðskrevjandi at eyðmerkja eigarar í summum felagsformum.

**Felagið Nótaskip** setir spurnartekin við, um tað skal vera nakað anti-trust mark, tí aðrar vinnur hava ikki tílíkt. Mælt verður frá at fara frá kravinum um veiðiloyvi. Verandi skipan er ein góð trygd fyri, at vit ikki brúka meira stál enn neyðugt. Ov umsitingarliga tungt. Ein so opin skipan fer at vera grundarlag fyri spekulatión og kreativiteti í fiskivinnuni. Skipatalið í uppsjóvarflotanum fer at økjast munandi, og fara eisini fleiri avlopsskip í okkara grannalondum at verða keypt og leigað til Føroyar. Eisini viðmerkir Felagið Nótaskip, at útluting um uppboðssølu ikki kann brúkast, tí eingin annar brúkar tað, og mett verður, at tað verður tikið ov nógv frá teimum verandi. Í mun til útlendskan eigaraskap hevur Felagið Nótaskip svarað, at felagið saknar útgreiningar av, hvussu stórur útlendski eigaraparturin er í føroyskum reiðaríum, og hvussu nógvur peningur fer av landinum og saknar lýsing av, um føroysku eigararnir eru førir fyri at keypa útlendska partin, vegna tær strongu reglurnar um avmarkaðan ognarskap. Uppskotið vil føra til verri fíggjarmøguleikar. 1/3 av fyritøkunum hava negativan eginpening, og eftir uppskotinum kann hetta talið væntast at hækka. Mett verður, at tað er ein harður dómur, at um útlendingarnir ikki eru burtur eftir fýra árum, so fella loyvini aftur til landið. Uppboðssøla av veiddum fiski verður mett at fara at lækka munandi um útflutningsvirðið og forðar fyri, at virki kunnu hava ávís skip knýtt at sær, og tí hava eina ávísa vertikala

integratión, sum ger, at raksturin verður skynsamari og effektivari. Harafturat verður víst á, at lógaruppskotið er fløkt, ógreitt og ófullfíggjað. Onki verður upplýst um, hvørjar avleiðingar tað fær fyri vinnuna, undir hesum tær stóru avleiðingar tað fær fyri nótaskipini. Meta ikki, at lógaruppskotið er búgvið til at verða lagt fyri Løgtingið, men mæla til, at verandi lóg um vinnuligan fiskiskap verður longd. Ov nógvar heimildir givnar landsstýrismanninum, og kunngerðir mangla at verða gjørdar, undir hesum um, hvussu uppboðssølan skal skipast.

**BankNordik** hevur sum so onga viðmerking til kvotur, men viðmerkir, at býtislykilin 75/25 kann tykjast órímiligur í summum førum. T.d. hava nøkur línuskip av ymiskum grundum ikki roynt so nógv undir Føroyum. Mæla til at luta kvotupartarnar eftir tali av fiskidøgum fyri hvørt fiskifar. Í mun til anti-trust hevur BankNordik m.a. svarað, at kravið eigur at vera munandi linari og ikki fyri hvørt fiskaslag. Um uppboðssølu hevur BankNordik m.a. viðmerkt, at talan er um ein ov fløkjasligan leist. Viðvíkjandi útlendskum kapitali verður mælt frá, at útlendskur kapitalur skal út. Tað sendir eitt keðiligt tekin til umheimin, og er tað ivasamt, hvussu avhendingin av útlendska ognarlutinum til føroyingar skal fara fram. Verður mett meira skynsamt at gera broytingar umvegis skatta- og avgjaldslóggávuna. Mælt verður eisini frá, at eitt felag ikki kann hava negativan eginpening í meira enn 2 ár á rað, tí tað er lítið sannlíkt, at reglan fær tilætlaða virknaðin. BankNordik saknar lýsing av, hvat ábyrgdarpeningur sambært uppskotinum er, og hvar hann stendur í mun til annan kapital. Um útboð av veiddum fiski mælir BankNordik frá at seta krav um, at 60% av allari veiðu skal á uppboðssølu. Tað forðar fyri virðisskapandi vertikalari integratión, har øll virðisketan verður optimerað. Annars tekur BankNordik undir við ætlanunum at tryggja lívfrøðiligu burðardygdina og stovnsrøktina av fiskastovnunum, men er skeptiskur um uppskotið. Víst verður m.a. á, at uppskotið ger tað minni áhugavert at fíggja fiskivinnuna og ikki minst nýggjar aktørar, tað er umfatandi og torgreitt, krevur ov nógva umsiting, gevur landsstýrismanninum ov stóra heimild at skipa og broyta fiskivinnuna, skapar óneyðuga nógva óvissu um fiskirættindini og setir ov nógvar avmarkingar og krøv til tey, sum ynskja at virka í vinnuni. Eisini verður víst á, at tað er óheppið at skula viðmerkja fiskivinnunýskipanina, uttan at kenna nærri til ætlanirnar um skatta- og avgjaldslóggávu ella uppboðssølu av fiskirættindum. Mælt verður til, at fiskirættindi, eins og fiskiskip, kunnu avhendast við einari tvingsilssølu sambært teimum reglum, sum núverandi lóggáva ásetir. Víst verður annars til hoyringssvarið.

**Faroe Origin** mælir til fiskidagaskipan heldur enn kvotuskipan. Orsøkin er, at fiskiskapurin er blandingsfiskiskapur, og vandin fyri útblaki er tí nógv størri við kvotuskipan. Mælt verður heldur til at broyta dagaskipanina við at inndraga núverandi fiskidagar, og útluta nýggjar eftir 75/25 býtislyklinum.
Faroe Origin gongur ikki inn fyri økiskvotum, tí tað er ikki rætt at lóggeva kvotur til ymisk øki í landinum.
Mælt verður frá at hava eitt samlað anti-trust mark, men bert fyri tær tríggjar súlurnar, botnfisk, fjarleiðir og pelagiskan fisk.
Tikið verður ikki undir við uppboðssølu, tí tað skapar ótryggleika fyri rættindini í framtíðini.
Viðvíkjandi markinum millum verandi og nýtt mælir Faroe Origin til hægri mørk fyri botnfisk, tvs. nær tað kann seljast á uppboði.
Tikið verður ikki undir við, at útlendskur ognarskapur ikki má vera í fiskivinnuni í Føroyum. Útlendskur kapitalur kann í ávísan mun vera við til at menna føroyska fiskivinnu bæði við kapitali, førleikum og vitan.
Viðvíkjandi útboðssølu av veiddum fiski er Faroe Origin harðliga ímóti kravinum. Hetta forðar fyri at virðisøkja og at integrera vertikalt.

Annars gongur felagið inn fyri eini skilagóðari stovnsrøkt, men vinnulig atlit mugu takast. Mælt verður frá, at tað ikki skal vera loyvt nøkrum skipi ella reiðaríi at hava negativa eginogn í meira enn 2 ár. Slík krøv eru ikki galdandi fyri nakra aðra vinnu í Føroyum og gevur ikki meining.

**Føroya Arbeiðsgevarafelag** tekur undir við, at fiskiskapurin verður skipaður meira burðardygt við umsitingarætlan og kvotuskipan.
Felagið er ímóti reglunum um anti-trust, tí tær føra við sær ineffektivitet. Okkurt mark kann vera fyri tað samlaða, men skal vera hægri enn tað, sum er í uppskotinum.
Felagið er ímóti uppboðssølu, tí tað vil føra til stutttíðarhugsan og 'winners curse'. Tað er betri at áseta eitt tilfeingisgjald.
Tikið verður undir við, at ein fiskivinnunýskipan eigur at vera grundað á m.a., at tað verður tryggjað, at skattur av vinningi, sum kemur úr føroyskum tilfeingi, verður goldin í Føroyum. Frælsi má vera at leggja viðurskiftini til rættis, tó við ávísum rímiligum avmarkingum, har atlit verða tikin at samfelagsvirðinum.
Kravd uppboðssøla av 60% av veidda fiskinum er ein forðing fyri, at fyritøkur kunnu skipa virksemið skynsamt - eitt nú við vertikalari integratión.
Uppskotið er ikki búgvið til at ummæla smálutirnar. Endamálið má vera at fáa sum mest burturúr og taka støði í vinnupolitikki og ikki sosialpolitikki. Vinnan missir møguleikan at innrætta seg, tá hon verður reguleráð niður í smálutir. Tað er lættari at keypa seg inn í vinnuna, um landið skattar ein rímiligan part av tilfeingisrentuni, og eina serskatting av vinningi við víðarisølu av loyvum og rættindum. Skattur av vinningi verður goldin í Føroyum.
Víst verður til hoyringssvarið.

**Fíggjarmálaráðið** viðmerkir, at økiskvotur kunnu skjótt gera útlutanina politiska og harvið virka beint ímóti ætlanini við nýskipanini, sum er, at tað er marknaðurin, sum ger av, hvør fær veiðirættindini.
Viðvíkjandi anti-trust verður viðmerkt, at grundgevingarnar, sum verða brúktar til at seta avmarkingar fyri ognarskap í fiskivinnuni, eru at tryggja kapping í vinnuni. Vanliga verða avmarkingar ásettar fyri, at stórir aktørar ikki skulu útnytta sína støðd fyri at at fáa politiska ávirkan og ávirka váðametingina av einum búskapi. Hesar kunnu ásetast við einum marki fyri samlaðu rættindini ella bólka rættindini í t.d. uppsjóvarfisk, botnfisk á fjarleiðum o.s.fr.
Tað gevur ikki góða meining at læsa uppboðssøluna alt ov fasta í lógartekstinum við at vísa, hvussu boðið verður út. Uppboðssølan skuldi verið politiskt óheft og bygt á objektivar ásetingar. Vantandi kontinuitetur av rættindum kann verða ein langtíðar kostnaður fyri samfelagið.

Viðvíkjandi markinum millum verandi og nýtt verður bert boðið út tey ár, tá kvotan liggur omanfyri eitt søguligt miðal. Tískil kunnu ár vera, har einki verður boðið út á marknaðin. Tað ger, at møguligir nýggir aktørar halda seg aftur.
Um landið krevur marknaðarprís fyri veiðirættindini, er ikki nøkur orsøk at avmarka útlendskum ognarskapi. Kravið, um at allur útlendskur eigaraskapur skal út innan 4 ár, rakar fyrst og fremst útlendsku eigararnar í føroysku fiskivinnuni, sum helst mugu selja sín part fyri undirprís. Hetta kann ávirka umdømi Føroya sum íløguland. At loyva útlendskari fígging, men ikki útlendskum íleggjarum, kann hava ta avleiðing, at verri verður hjá føroysku fiskivinnuni at fíggja sítt virksemi. Skulu útlendingar fíggja tað, sum teir eiga í dag, fara teir helst at seta størri krøv til sína íløgu og ikki vera líka váðafúsir. Útihýsir vitanardeiling við umheimin. Tilgongdin av útlendskum kapitali kundi verið við til at minka um váðan fyri føroyska samfelagið, við tað at føroyskur kapitalur ikki gerst meira bundin enn neyðugt av gongdini í fiskivinnuni.

Kravið um uppboðssølu av veiddum fiski, er ikki bert óneyðugt – tað kann eisini vera búskaparliga óheppið. Tað kann vera ein forðing fyri vertikalari integratión, sum kann vera skynsamt og økja um produktivitetin í vinnuni. Og tað kann vera í beinleiðis mótsøgn við politiska viljan um víðari virðisøking í fiskivinnuni.
Nógvu avmarkingarnar í lógini minka um tilfeingisrentuna. Forboð at virka veiðu umborð er í andsøgn við málið um størst møguliga virðisøking.
Víst verður annars til hoyringssvarið.

**Føroya Reiðarafelag** mælir til at varðveita fiskidagaskipanina og undrast á, at útróðrarflotin framhaldandi skal virka undir dagaskipan.
Økiskvotur eru sum heild ikki eitt fiskivinnupolitiskt amboð, sum er væl egnað til at býta kvoturættindi millum aktørar í fiskivinnuni. Talan er um politiska fordeiling til ávís øki í landinum.
Herdar reglur um anti-trust fara at hava negativar avleiðingar fyri flotan. Mørkini fyri einstøku fiskasløgini forða fyri spesialisering innan ávísa framleiðslu, og kunnu harvið eisini forða fyri virðisøking. 12%-markið er eisini ov lágt sett, men Reiðarafelagið mælir tó til, at eitt samlað anti-trust mark skal vera. Víst verður á niðurstøðurnar hjá Nýskipnanarnevndini. Umsitingarliga eru hesar reglur ein ov stór byrða hjá Fiskimálaráðnum.

Tað er órógvandi, at veiðiloyvini verða tikin burtur. Hetta hevur verið ein trygd fyri, at flotin ikki er vaksin, men heldur tillagað seg við færri skipum, og ein rationalisering er farin fram. Samlaði fiskiskapurin fer at gerast minni lønsamur, meira stál skal forrentast við sama veiðigrundarlagi, og tað fer at minka um virðisøkingina í teimum ymsu fiskiskapunum. Mælt verður til at leingja verandi loyvi ella at útskriva nýggj brúksloyvi til verandi aktørar. Vandi er fyri, at fiskifør verða undirbjóðað, og at leiguskip eru gomul og ikki liva upp til hægstu tøkniligu krøvini, og at hetta kann ganga út yvir rávørugóðskuna.

Føroya Reiðarafelag tekur ikki undir við uppboðssølu sum amboð til útluting av veiðirættindum. Tað skapar ótryggleika og førir við sær, at avlopið í vinnuni kann minka. Ístaðin skuldi ein skipan við tilfeingisgjaldi verið nýtt. Harumframt er tað ov ógreitt í lógini, hvussu uppboðssølan skal skipast. Landsstýrismaðurin hevur ov víðar heimildir. Einki annað land kring Føroyar nýtir uppboðssølu sum amboð til útluting av fiskirættindum. Landsstýrið hevur ætlan um, at øll fiskirættindi við tíðini skulu seljast á uppboðssølu. Tá lítil nøgd verður bjóðað út, kann prísurin gerast høgur. Avleiðingarnar eru, at tað er torført at endurnýggja flotan, virðisøkingin verður minni, færri íløgur verða gjørdar, og arbeiðskorini hjá manningini verða ótrygg. Víst verður til kanning í Noregi, sum lýsir nakrar veikleikar við uppboðssølu, m.a. at prísásetingin kann vera tilvildarlig og svarar tí ikki altíð til tað yvirnormala yvirskotið. Trupult verður eisini at gera avtalur við keyparar úti í heimi.

Verandi skipan hevur síni lýti við nýggjum rættindum. Reglur um uppboðssølu hava við sær eina niðurlaðing av verandi rættindum. Ov lítil atlit verða tikin at verandi feløgum og persónum. Seld rættindi nartla burturav verandi rættindum við tíðini, tá ið heildarkvoturnar sveiggja. Verandi rættindi luttaka í niðurskurðinum av heildarkvotuni, men ikki í sama lutfalli í hækkingini. Nýggir aktørar økja kapasitetin. Søguliga veiðan av toski, hýsu og upsa undir Føroyum er søguliga nógv hægri, sostatt vera verandi rættindi niðurlaðað enn skjótari. Markið fyri, nær bjóðast skal út, eigur at verða sett grundað á eitt 20 ára tíðarskeið. Talva við "niðurlaðingini" fylgir við, men roknihátturin er skeivur. Fyri uppsjóvarfisk sleppa verandi aktørar ikki at bjóða uppá langtíðarrættindi. Politisk óvissa er fyri verandi rættindi, tá Løgtingið skal leingja loyvini.

Mælt verður frá at seta forboð fyri útlendskum kapitali. Hetta verður ein meinbogi fyri fleiri feløg í fiskivinnuni. Skiftistíðin er ov stutt. Tiltøk at halda útlendingum úti kunnu verða tyngjandi hjá verandi flota. Vinnan missir atgongd til váðafúsan útlendskan kapital. Vinnan missir atgongd til vitan og netverk út í heim v.m. Mælt verður til, at verandi útlendskir eigarar sleppa at varðveita sín ognarlut (sum í alivinnuni). Munandi upphæddir skulu flytast av landinum. Tað verður ikki mett, at eigarar, sum eru omanfyri anti-trust markið, kunnu keypa útlendskar minnilutaeigarar úr felagnum. Tað er torført at fáa ein triðjapart at keypa minnilutapartar. Hetta hevur víðgongdar avleiðingar fyri vinnuna, og mælt verður til munandi longri skiftistíð.

Útboðssøla av veiddum fiski skerjir virkisfrælsið hjá flotanum, eitt nú ísv. vertikal integratión. Uppskotið eigur ikki at verða lagt fyri Løgtingið í hesum líki, tí tað er ikki búgvið til politiska viðgerð. Her er ov nógv ógreiða. Uppskotið má til nýggja viðgerð í umsitingini og ikki minst í vinnuni. Herd brúksskylda, herdar reglur um avhending og hert eftirlit skerja virkisfrælsið hjá flotanum. Spurningurin er eisini, um útlendskir eigarar skulu út, og hvørjir møguleikarnir eru hjá føroyska eigaranum at keypa. Viðvíkjandi ásetingini um negativan eginpening, so høvdu 1/3 av feløgunum negativan eginpening í 2015. Hetta er ein sera víðfevnd skylda at boða frá um fíggjarviðurskifti, og er hon strangari enn fyri aðrar vinnur. Hetta hevur stórar umsitingarligar byrðar við sær. Tað verður verri at fáa fígging til skipakeyp. Feløg áttu frítt at kunna avhendað kvotu innanhýsis fyri eitt ár í senn.
Viðvíkjandi viðmerkingum annars verður víst til hoyringssvarið.

**Felagið Garnaskip** ynskir ikki at koma undir eina kvotuskipan. Garnafiskiskapur er sera selektivur fiskiháttur, ið sambært galdandi skipan er stýrdur við garnatali og meskastødd. Harafturat er svartkalvastovnurin ein ferðandi fiskastovnur, sum eisini er heimahoyrandi í sjóøkinum hjá okkara grannalondum, og fiskiskapurin er tískil sera ójavnur.
Kvotur fara at raka reiðaríini sera ymist. Um landsstýrismaðurin kortini velur at áseta kvotur fyri garnaskipini, eigur loyvið at telja 50% og søgulig veiða at telja 50%.
Garnaskip hava ikki fingið lut í nýggjum rættindum seinastu árini, tað skal takast við í metingina, tá ið fiskiskapurin við gørnum verður skipaður frameftir.

**Felagið Trolskip og Felagið Lemmatrolarar** mæla til at varðveita fiskidagaskipanina.
Kvotuskipan er ikki tann rætti hátturin at skipa fiskiskapin undir Føroyum.
Viðvíkjandi reglunum um anti-trust er markið fyri tey ávísu fiskasløgini í føroyskum sjógvi upp á 15 prosent ov lágt sett, hetta rakar summi feløg.
Felagið Trolskip og Felagið Lemmatrolarar taka ikki undir við uppboðssølu, tí tað skapar óvissu og ótryggleika fyri rættindini í framtíðini. Um landsstýrismaðurin ætlar at selja kvotur á uppboði, eiga hesi rættindi at verða seld verandi aktørum, soleiðis at fleiri ikki koma inn í fiskiskapin.
Viðvíkjandi markinum millum verandi og nýtt eru mørkini fyri tosk, hýsu og upsa ov lágt sett. Tað skuldi heldur verið hugt at einum 20 ára tíðarskeiði, tá mørkini, fyri nær botnfiskur undir Føroyum kann bjóðast út, verða sett. Verandi minka ov skjótt.
Annars eru viðmerkingar eisini gjørdar um m.a. umrokningina av fiskidøgum. Víst verður til hoyringssvarið.

**Fróðskaparsetur Føroya** mælir til, at fiskifør skulu uppgeva hjáveiðuna av ymsu sjófuglasløgunum, og at tað skal vera møguligt hjá føroyskum granskingarstovnum og lærdum háskúlum at heita á skip um at samla og frysta eitt ávíst tal av sjófugli, ið verður fingin sum hjáveiða.

**Reiðarafelagið** (vegna JFK og Framherji) mælir frá, at forðað verður fyri, at útlendskir íleggjarar kunnu veita váðafúsa fígging og íløgur til føroysku fiskivinnuna. Víst verður á møguleikan á minni víðgongdum avmarkingum, t.d. avmarking til einstøku íleggjarar. Víst verður á, at søguligt hevur verið brúk fyri útlendskum váðafúsum kapitali. Víst verður eisini á, at mann fer frá váðafúsum íløgum til váðaøkjandi lán, og at mann fær útlendsk aktiv ístaðin fyri útlendsk passiv (vinnutól). Harafturat verður víst á, at ein stutt skiftistíð leggur ræðisrættin á útlendskar hendur (somu sjónarmið sum Reiðarafelagið hevur víst á).
Møguleikarnir fyri menning verða álvarsliga skerdir, um forðað verður fyri, at útlendskir íleggjarar kunnu veita váðafúsa fígging og íløgur til føroysku fiskivinnuna. Avmarking fyri, hvussu nógv útlendskur eigari kann eiga av atkvøðum á aðalfundi felagsins. Hvør kann keypa útlendskan ognarlut, tá meirilutaeigarin samstundis er omanfyri 'anti-trust' markið. Harður dómur fyri føroysku eigararnar at missa loyvini, um útlendingarnir ikki eru burtur eftir 4 árum.

**Ragnar Mortensen** viðmerkir, at tað ikki tænir nøkrum endamáli at brúka bruttotonnagu (BT) til at avgera, hvør bátur skal í hvønn bólk, tí bruttotonnagan hevur einki við veiðievnið hjá bátinum at gera. Hann mælir til, at LOA (length over all) verður brúkt ístaðin.

**Føroya Landfúti** viðmerkir, at tað er natúrligt og skilagott, um Vørn í størri mun fær møguleika at taka fyrisitingarligar avgerðir á økinum, undir hesum at álegga uttanrættarligar bøtur. Viðvíkjandi ásetingunum um konfiskatión metir fútin, at tað kann vísast til ásetinarnar í revsilógini um konfiskatión.

**Fiskimálaráðið skal viðmerkja til innkomnu hoyringssvarini:**
Landsstýrismaðurin og Fiskimálaráðið hava viðgjørt tær innkomnu viðmerkingarnar. Viðmerkingarnar eru sera rúgvusmiklar, og landsstýrismaðurin ger tí niðanfyri viðmerkingar til nøkur høvuðsevni, sum eru afturvendandi í viðmerkingunum hjá hoyringspørtunum og til onnur viðurskifti, ið víst hevur verið á.

Fleiri av viðmerkingunum í hoyringssvarunum hava verið orsøk til broytingar í uppskotinum, og tað framgongur av viðmerkingum landsstýrismansins, hvørjar broytingar talan er um.

*Kvotur í botnfiski undir Føroyum*
Flestu hoyringspartar mæla frá at fara frá fiskidagaskipan til kvotuskipan í fiskiskapi eftir botnfiski undir Føroyum.

Landsstýrismaðurin viðmerkir, at tað avgjørt eru sera stórar avbjóðingar við kvotuskipan, serliga í mun til útblaking og blandingsfiskiskapin undir Føroyum, og at tað tí er skilligt, at mótstøða og atfinningar eru frá flestu hoyringspørtum umboðandi feløg í vinnuni.

Grundgevingin fyri at skjóta upp kvotuskipan er grundað á lutvíst somu atlit sum tilmælið frá stóra meirilutanum í nevndini, ið gjørdi uppskot til eina nýggja og varandi fiskivinnuskipan fyri Føroyar: At royndirnar vit hava gjørt okkum av skipanini við fiskidøgum og tekniskum reguleringum um reiðskap og ymsar friðingar, hava ikki megnað at tryggja góða stovnsrøkt og at stuðla undir lívfrøðiliga burðardyggan fiskiskap. Og at fiskidagaskipanin ikki eggjar til bestu búskaparligu tillaging í vinnuni.

Uppskotið mælir framvegis til kvotuskipan við hesi grundgeving og atlitum til teir vansar, ið eru ávístir frá hoyringspørtum: Í fyrsta lagi, at ein kvotuskipan – treytað av neyðugum amboðum og eftirliti, ið kunnu minka um vansarnar – kann tryggja eina betri stovnsrøkt og burðardygga úrtøku úr stovnunum. Og í øðrum lagi, at ein kvotuskipan – serliga við

eginkvotum – eggjar til at fáa meira vinning og búskaparligt virði burturúr hvørjum kilo av fiski, heldur enn at eggja til at fiska øktar nøgdir í fiskidøgum.

Í uppskotinum eru sett ein røð av amboðum, ið skulu minka um vansarnar – og nakrar eru lagdar afturat eftir hoyringarnar:

- At umsitingarætlanir, ið fevna um longri tíðarskeið verða grundarlag undir áseting av mest loyvdu veiði og kvotum. Tá ið stovnarnir eru omanfyri lívfrøðilig minstamørk, verða við umsitingarætlanum færri sveiggj í kvotuásetingunum.
- At tey vinnurekandi hava samansettar kvotur og hjáveiðimøguleikar.
- At krav er um at taka alt til lands, og at ótilætlað veiða altíð kann avreiðast, har ein prosentpartur av avreiðingarvirðinum verður endurgoldin til skip og manning.
- At til ber at flyta ein prosentpart av kvotum tvørturum fiskiár (nýggj áseting).
- At eftirlit á bæði sjógvi og við landing verður munandi hert.
- At revsireglurnar verða herdar.

*Økiskvotur*
Nógv mótmæli hava verið ímóti heimildini at partur av útbodnum kvotum kunnu bjóðast út við treytum um økisatlit. Víst hevur verið á, at heimildin er ov leys og tilvildarlig. Í uppskotinum er hetta broytt til heimild at bjóða fram royndarkvotur og ávísan prosentpart av kvotum til menningarkvotur, har eisini atlit til økir í landinum kunnu takast. Í lógini verður nú útgreinað við hvørjum treytum, menningarkvotur kunnu bjóðast fram.

*Mørk fyri miðsavnan av fiskirættindum (anti-trust)*
Viðmerkingarnar og atfinningarnar til reglurnar at forða miðsavning av fiskirættindum (anti-trust) eru nógvar, men eisini ymiskar. Flestu hoyringspartar halda, at mark skal vera, men halda, at tað skal ásetast øðrvísi.

Viðmerkingarnar eru partvíst tiknar til eftirtektar. Mørkini eru broytt, soleiðis at markið fyri, hvør atgongdin kann vera til samlaða føroyska tilfeingið, er sett til 17,5%. Og síðani eru tríggir høvuðsbólkar settir í mun til mørk fyri einstøk fiskasløg: Uppisjóvarfiskur, botnfiskur undir Føroyum og fiskiskapur á fjarleiðum. Markið her er sett til 20% fyri hvønn bólkin.

Grundgevingarnar fyri reglunum um miðsavnan av atgongdini til rættindini eru bygdar á trý atlit:

1. At tryggja, at fleiri kunnu taka lut og kappast um at fáa sum mest burturúr tilfeinginum.
2. At spjaða váða og tryggja, at føroyski búskapurin ikki verður ov bundin at einstøkum fyritøkum.
3. At tryggja, at einstakar fyritøkur ikki gerast ov ráðandi í virði og valdi búskapinum, vinnuni, atknýttum vinnum og samfelagnum – soleiðis, at fólkaræðið og politiska skipanin verða ov bundin at taka avgerðir fyri samfelagið alt.

*Veiðiloyvi burtur - rættindi leys av fiskifari*
Atfinningarnar ímóti at strika kravið um taka veiðiloyvi og at rættindini at veiða verða leys av fiskifarinum snúgva seg bæði um um, at hetta fer at gera vinnuna minni effektiva, tí at óneyðuga nógv skip/stál verða í vinnuni. Og at hetta skal elva til verri skip og verri umstøður hjá manningum og á arbeiðsmarknaðinum.

Til hetta skal viðmerkjast:

- At krav verður framvegis um, at bert skip, sum eru skrásett í Føroyum, lúka treytir til fiskiskip og hvørs eigarar lúka herdu treytirnar í lógini um bústað í Føroyum, føroyskan ognarskap, skatting í Føroyum og herdu krøvini um maningarviðurskifti, sáttmálar, landing í Føroyum o.a., kunnu hava atgongd at fiska.
- At krøvini til manningarviðurskifti verða munandi herd í nýggju skipanini: Krav verður um í øllum fiskiskapi, at øll manningin skal lønast sambært sáttmálum hjá føroyskum manningarfeløgum, at manningin skal gjalda skatt í Føroyum, og skal hava arbeiðs- og uppihaldsloyvi. Hetta eru treytir, sum føroysku manningarfeløgini hava mælt til í mong ár, og sum nú á fyrsta sinni verða sett í verk.
- At bæði lógin um fyrisiting av sjófeingi og broytingar í skattalógini, sum eru fráboðaðar at fremja tilmælini um at forða fyri, at vinningsbýti verður flutt av landinum, transfer-pricing, roknskaparreglur o.a. eru munandi herðingar í broytingar í mun til galdandi lóggávu
- At við kvotum og øktari kapping um at fáa mest burturúr, eigur hetta at eggja til at fáa sum mest burturúr og at brúka bestu amboð.
- At við at sleppa kravinum um veiðiloyvi, verða eisini skaptir betri møguleikar hjá vinnurekandi og nýggjum aktørum at bjóða seg fram, leggja til rættis og velja bestu amboð.
- At broyting er gjørd í uppskotinum soleiðis, at eigarar av fiskiførum og tey, ið hava atgongd at bjóða seg fram, skulu hava verið skrásett í fólkayvirlitinum og hava goldið skatt seinastu tvey árini.

*Uppboðssøla*
Nógv mótmæli eru móti uppboðssølu. Fleiri hoyringspartar eru grundleggjandi ímóti eini skipan við útboði og uppboðssølu, og hartil eru sterkar atfinningar mótvegis, hvussu skotið er upp at bjóða út, hvar mørk verða sett, og at uppskotna skipanin er ov fløkt.

Uppskotið er broytt soleiðis, at skipanin og mørkini nú eru einfaldari. Hildið verður fast við útbjóðing og uppboðssølu. Hetta fyri at tryggja ein marknað, atkomuligheit og kapping um at fáa sum mest burturúr tilfeinginum og at tryggja eina marknaðargrundaða prísáseting fyri tilfeingisrentuna. Hartil er eitt grundleggjandi sjónarmið hjá landsstýrinum, at besti háttur at skapa eina gjøgnumskygda atgongd til eitt felags tilfeingi er at bjóða tað fram á einum opnum marknaði.

*Útlendskur ognarskapur*
Flestu hoyringspartar mæla frá einum forboði móti útlendskum kapitali í fiskivinnuni, tí hesin mennir vinnuna, og harafturat verður tað trupult fyri vinnuna at fáa annan kapital til vega fyri tann útlendska kapital, sum er í vinnuni í dag.

Landsstýrismaðurin metir tó, at tað er umráðandi at halda fast við hesum forboði, soleiðis at tryggjað verður, at ræðisrætturin til tilfeingið er á føroyskum hondum, at vinningurin og virðini av hesum eru í føroyska samfelagnum, og at atgongdin at gagnnýta føroysk rættindi er hjá feløgum og persónum, sum eru búsitandi og fult skattskyldug í Føroyum. Hartil er munandi einfaldari at hava eftirlit við útlendskum ognarskapi við hesum ásetingum, heldur enn verandi skipan, har prosentlutur er loyvdur.

Ein skiftisregla er ásett, sum skal geva vinnuni neyðugu tíðina at finna nýggjar loysnir.

*Krav um útboð av veiddum fiski*

Mótmælini móti útboðssølu av veiddum fiski snúgva seg í høvuðsheitum um, at hetta forðar fyri virðisøking og vertikalari integrasjón.

Landsstýrismaðurin heldur, at tað er neyðugt at skapa atkomiligheit og kapping hjá føroyskum virkjum at bjóða seg fram at virka burturúr føroyska tilfeinginum og at tryggja eina kapping um besta prís fyri fiskin. Hetta er endamálið við kravinum

Uppskotið er broytt soleiðis, at kravið er linkað til 20% av veidda fiskinum.

*Negativur eginpeningur og aðrir spurningar um fígging og avkast*
Til hoyringssvarini, ið hava mælt til at strika ásetingarnar um forboð fyri negativum eginpeningi, er hetta tikið til eftirtektar. Aðrar ásetingarnar í lógini, umframt broytingar í skattalógini, ið verða lagdar fram í heyst, kunnu tryggja sama endamál. Hesar broytingar eru m.a. – við støði í álitinum og tilmælunum frá nevndini at gera uppskot til nýggja fiskvinnuskipan:

- Nevndin mælir til at treytir verða settar í fiskivinnulóggávuna, sum tryggja, at inntøka frá fiskiveiði hjá persónum og feløgum kemur til skattingar í Føroyum og ikki í øðrum landi. Tí skal krav setast um at persónar ikki skulu verða heimahoyrandi í øðrum landi sambært tvískattasáttmálum. Fyri feløg skal krav setast um at veruliga leiðslan í feløgum skal verða í Føroyum. Talan er um skattlig hugtøk.
- Nevndin mælir til at varðveita ásetingina um at avmarka ábyrgdarlán úr útlondum.
- Nevndin mælir til at forðað verður fyri lánum úr útlondum, har renturnar ella tað, sum skal rindast aftur er knýtt at yvirskotinum í føroysku feløgunum.
- Nevndin mælir til, at stjórar í feløgum skulu verða búsitandi í Føroyum og skattskyldugir í Føroyum, meðan teir eru stjórar.
- Nevndin mælir til, at skattalóggávan verður broytt soleiðis, at forðað verður fyri, at ov stórur frádráttur fæst fyri fíggjarútreiðslur. Nevndin vísir í hesum sambandi til tilmæli frá OECD um at avmarka frádrátt fyri fíggjarútreiðslur til ein prosentpart av inntøkum áðrenn rentur, avskrivingar og skatt, EBITDA. Við slíkum reglum metir nevndin, at forða verður fyri at fíggjarligt avkast verður flutt av landinum og at tryggjað verður, at inntøka frá føroyskari fiskiveiði kemur til skattingar í Føroyum.
- Nevndin mælir til, at krav verður sett í skattalóggávuna um uppbýti av virksemi hjá feløgum, ið reka fiskiveiðu, soleiðis at tað verður upplýst, hvørjar inntøkur, útreiðslur og íløgur hoyra til fiskiveiðu, og hvat hoyrir til annað virksemi. Nevndin metir, at tað er umráðandi við hagtølum, sum vísa rakstur og íløgur fyri fiskiveiðu.
- Nevndin mælir til at eftirkanna, um tað er ein trupulleiki, at hall frá øðrum virksemi enn fiskiveiðu verður drigið frá í inntøku frá fiskiveiðu. Um so er, ber til at gera avmarkandi reglur í skattalóggávuni fyri hesum. Slíkar reglur, sum avmarka frádrátt fyri hall í inntøku frá bert einari vinnugrein, eiga tó bert at verða gjørdar, um hetta veruliga verður mett at vera ein trupulleiki.
- Eisini mælir nevndin til eftirmeting av øðrum ásetingum í skattalóggávuni, herundir reglunum um transfer pricing, um tunna kapitalisering, um avmarkaða skattskyldu fyri renturinntøkur og um framføring av halli. Her er talan um reglur, sum ikki hava serligt tilknýti til fiskiveiði, men sum eru alment galdandi og sum hava sum endamál at

tryggja, at skattagrundarlagið ikki verður máa burtur, m.a. við handli millum nærskyldar partar.

*Annað*

Til hoyringssvarið frá Felagnum Trolbátar (bólkur 4T) har mælt verður til, at teir halda fram undir fiskidagaskipanini, hevur landsstýrismaðurin tikið hetta til eftirtektar og strikað ásetingina í uppskotinum um, at trolbátarnar skulu vera partur av kvotuskipanini.

Til hoyringssvarið frá Felagnum Garnaskip skal viðmerkjast, at sambært uppskotinum verður skipanin fyri garnaskip framvegis skipað á sama hátt sum í dag er galdandi við loyvum.

Til hoyringssvarið frá Vørn og teirra uppskot til rættingar v.m. til einstøku greinarnar í uppskotinum skal viðmerkjast, at viðmerkingarnar eru í høvuðsheitum tiknar til eftirtektar. Hetta hevur havt við sær broytingar í m.a. revsireglunum.

Til viðmerkingarnar frá Vørn og serliga Skráseting Føroya um felagsformarnar, har tað m.a. verður viðmerkt, at tað er torført at eftirkanna ongarviðurskiftini í summum feløgum, skal viðmerkjast, at uppskotið nú er broytt sambært hesum viðmerkingum soleiðis, at tað sum útgangsstøði bert fevnir um partafeløg og smápartafeløg. Tó kunnu feløg og grunnar, sum hava rikið fiskifar í 2017, undir ávísum treytum halda áfram. Broytingarnar eru grundaðar á eitt ynski um gjøgnumskygni og fyri at lætta um umsitingina av reglunum.

**Høgni Hoydal**
*landsstýrismaður*